# Tordi ikki inn í Rúsuna

Um midnáttarleitið mikukvøldið var onkur, sum ætlaði sær ein dropa úr Rúsuni í Havn, men dirvið sveik. Rúsan er í Miðlon, og onkur er farin við einum stórum steini og hevur smildrað ein rút, har Rúsan er. Men tá ið alarmurin gjørdi vart við seg, rýmdi innbrotsmaðurin við tómum hondum. Hann var so kvikur avstað, at hann var ikki at síggja, tá ið politiið kom har beint eftir. Innbrotið gav nógv arbeiði til starvsfólkini í Rúsuni, tí nógv glasbrot vóru at taka upp.



# Nógvar tvingsilssølur

Teir seinastu ellivu mánaðirnar eru 205 hús og aðrar fastar ognir í Reykjavík seld á tvingsilsuppboði. Sostatt er hetta árið munandi verri enn árið í fjør, tí tá vóru 161 ognir seldar á tvingsilsuppboði alt árið, skrivar Vísir. Tølini eru tó smá samanborið við talið á umbidnum tvingsilssølum. Vísir skrivar, at higartil í ár hava myndugleikarnir fingið boð um at selja áheitan um at selja 2.242 fastar ognir á tvingsilssølu. Alt árið í fjør vóru áheitaninar 2.277 í tali. Nógvir bilar enda eisini á tvingsilssølu, og higartil í ár hava 491 bilar fingið ta lagnuna, skrivar Vísir.

# Sum í geglinum

**Teir 38 menninir umborð á Skálabergi líða onga neyð og royna at stytta sær stundir við at spæla kort og hyggja í sjónvarp**

**SKÁLABERG**
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í tríggjar vikur hevur Skálaberg nú ligið á redini í Murmansk, og eins og reiðaríið bara bíða teir 38 menninir umborð eftir, at okkurt skal henda.

Men einki er enn hent. Teir vita púrt einki. Nær verður skipið leysgivið? Nær sleppa teir heim? Verða teir noyddir at halda jól í Barentshavinum?

Einki svar.

Tíðin fellur teimum long, og svarið upp á spurningin um, hvussu teir fáa tíðina at ganga er: Spyr teir, sum sita í spjellinum. Teir sita umborð á Skálabergi og hava einki at gera.

Tíðin gongur við at spæla kort, hyggja í sjónvarp og hyggja at videofilmum.

Onkuntíð finna teir uppá at seta seg saman at syngja, sjálvt um lagið ikki er nakað serligt.

Ein dag vóru nakrir av monnunum úti á dekkinum og gjørdu kavamann.

Veðrið er gott og ikki so kalt, um frostmarkið.

## Vóna

Sum skilst hava teir enn nóg mikið av provianti, so í so máta lía teir onga neyð.



*Tað er ikki nógv at finna nú uppá umborð á Skálabergi, sum hevur ligið í tríggjar vikur. Mikukvøldið settu teir seg saman eina løtu at syngja og spæla*

Men teir hava ikki slept vónini um at sleppa heim til jóla.

Herfyri segði reiðarin Hanus Hansen, at roynt varð at fá 28 av monnum heim, men enn er eingin sloppin av skipinum.

Tey heima vita líka so lítið sum menninir, nær teir koma heim, og um teir sleppa heim til jóla.

Eftir røttum skuldi manningin komið heim 9. november, tá ið hin manningin stóð klár. Men so fingu teir boð um at fiska nakrar dagar aftrat.

Tað bleiv til nógvar dagar aftrat í Barentshavinum.

# Statsligt sjórán

**Tá ið eitt skip sum Skálaberg verður tikið fyri longri tíð og ikki fær sektaruppskot, er tað álvarsligt brot á altjóða reglur. Bæði reiðarar og sjómenn aftrat seg við at fara í Barentshavið aftur, sigur Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag**

**SKÁLABERG**
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Føroya Reiðarfelag heitir nú á myndugleikarnar um at brúka alla orku sína til at loysa Skálaberg og manningina úr tí fangaskapi, teir veruliga eru komnir í, sigur felagið.

- Slíkt er ongantíð hent áður, og eingin kundi vønta, at hetta kundi henda í 2009, sigur Viberg Sørensen, formaður í felagnum.

Hann væntar, at eftir hesa hendingina fara allir reiðarar at aftra seg við nakrantíð at senda skip síni í Barentshavið.

- Og einki er at siga til, at sjómenn kenna seg ótryggar við aftur at fara í russiskan sjógv, sigur Viberg Sørensen.

Hann skilir ikki, at hendingin ikki hevur fingið meira umtalu úti í heimi og í Danmark.

## Brot á altjóða reglur

Altjóða reglur siga, at tá ið eitt skip verður tikið, skal tað hava sektaruppskot í seinasta lagi 24 tímar eftir, at tað er komið til lands, og so skjótt sum reiðaríið hevur veitt trygd fyri sektini, sleppur skipið út aftur.

- Tað óhugnaliga við hesum máli er, at skipið varð kallað inn, uttan at orsøkin varð upplýst. Einki sektaruppskot erkomið, men reiðaríið hevur veitt trygd. Skipið er kortini ikki sloppið leyst aftur. Tað er púra óhoyrt, sigur Viberg Sørensen.

Mannagongdin undanfarin ár hevur verið, at reiðaríni hava flutt kvotur sínamillum, og tá ið samanlagda kvotan hevur verið fiskað upp, hava russisku myndugleikarnir fingið boð um tað.

Tað einasta, sum er øðrvísi hesa ferð, er, at skriv varð sent úr Føroyum um, at Skálaberg fór at fiska av kvotuni hjá Sundabergi, sigur Viberg Sørensen.

## Hartar ongan

Út frá tí, sum upplýst er í málinum, dugir hann ikki at síggja, um nakar, og um so er, hvør hevur borið seg skeivt at. Hann lastar ikki føroysku myndugleikarnar fyri nakað.

- Føroya Reiðarafelag hyggur við álvarsomum eygum at hesum. Russland hevur tikið eitt skip, og tað vil eg nevna statsligt sjórán, sigur Viberg Sørensen.

Hann heldur eisini, at alt framtíðar samstarv millum Føroyar og Russland við hesum er sett upp á spæl.



*Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag stúrir fyri framtíðar samstarvinum millum Føroyar og Russland*